umhvørvisstovan

SKOPUNAR KOMMUNA
TORMANSVEGUR 2
240 SKOPUN

Argir hin 9. desember 2013
Málsnr.: 11/00023-46
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Mortensen

**Spillivatnsætlanin er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 9. desember 2013, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Skopunar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 26.11.2013 spillivatnsætlanina hjá Skopunar kommunu til góðkenningar (mál nr. 11/00023-43). Ætlanin er gjørd av PB Consult, ráðgevandi verkfrøðingum, og hevur Skopunar kommuna hin 21. november 2013 samtykt ætlanina, mál nr. 11/00023-48.

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørvisliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til, hvørjar tekniskar loysnir eru valdar ella um tekniskú viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Skopunar kommuna hevur søkt um undantak frá ásetingini í § 12, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn, sum sigur, at spillivatnsútleiðingar ikki mugu leiðast út innan fyri molar, í hesum føri er talan um eina útleiðing innan fyri ein brimgarð. Orsøkin er nógv brim og vanda fyri at útleiðingin brotnar. Í ætlanini verður sagt, at mett verður ikki, at vandi er fyri at spillivatn savnast innanfyri brimgarðin, tí har er sera gott vatnskifti á víkini.

Við omanfyri nevndu grundgevingum, verður undantak givið við heimild í § 12, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum ella til smittuvanda, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um, at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá tí, at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi, beinleiïs og persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Maria Gunnleivsdóttir Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postmoga 9, FO-110 Tórshavn
PB Consult, R.C. Effersøesgøta 24, Postmoga 1395, FO-110 Tórshavn